# Tað varð Lotte

**Tað verður Lotte Sørensen, sum skal venja kyndilskvinnurnar restina av árinum**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Seinastu tíðina hevur fleiri ferðir verið skrivað um truplu støðuna viðvíkjandi venjara, sum kyndilskvinnurnar hava verið í. Frá byrjan av kappingarárinum varð Birgir Hansen settur sum venjari, men millum annað gjørdu trupulleikar at samansjóva arbeiði og venjing sítt til, at hann seint í heyst ikki helt seg til uppgávuna longur.

### Lotte er sett

Síðani hevur verið leitað eftir einum hóskandi venjara, sum kundi átaka sær uppgávuna, og nú er umsíður líkt til, at hesin spurningur er loystur. Lotte K. Sørensen, sum nú á fjórða ári spælir við kyndilsliðnum, og sum harumframt eisini hevur virkað sum ungdómsvenjari í felagnum, hevur játtað at tikið sær av uppgávuni, og fyrsti venjingartími hennara var týskvøldið.

### Stór frágongd

Um uppgávuna, sum nú stendur fyri framman, hevur Lotte enn ikki so nógv at siga til.

– Higartil hevur bert tann eina venjingin verið, og fyrst og fremst skulu vit líka sum koma í gongd aftur, sigur hon.

At kyndilsliðið neyvan verður ein partur av gullstríðnum í ár, tykist at kalla avgjørt longu, men hóast hetta, so nýtist árið ikki at vera spilt av teirri orsøk. Sjálv heldur Lotte, at tað nú ræður um at taka ein dyst í senn, og so síggja, hvussu langt hetta ber. Enn er vónin fyri heiðursmerkjum ikki heilt kámað burtur, men Lotte er tó fullgreið um, at uppgávan - á pappírinum í øllum førum - tykist trupul.

– So at siga øll hini liðini eru styrkt í vetrarsteðginum. VB, VIF, Neistin, Stjørnan og Tjaldur hava øll fingið tilgongd, meðan vit bara hava mist leikarar, so úrslitini hjá okkum verða kanska eins nógv tengd at, hvussu nýggju leikararnir fella til á sínum liðum.

At talan veruliga er um stóra frágongd á kyndilsliðnum er lítið at ivast í. Christina Holm hevur síðandi vetrarsteðgin spælt við VB, og til komandi uppgávurnar má liðið vera tríggjar stuðulsspælarar fyri uttan. Brynhild Klein, Jórun Ludvig og Signhild Petersen verða ikki tøkar komandi vikuskifti, og meðan tær báðar fyrst nevndu aftur verða at síggja seinni í ár, so verður Signhild verandi uttanlands í útbúgvingarørindum.

Sum sagt, so er Lotte tó farin undir uppgávuna við góðum treysti, og hvussu langt hetta ber, fæst partvíst at vita komandi leygardag, tá Kyndil skal royna seg í lokaluppgerðini móti Neistanum.



*Eftir at kyndilskvinnurnar í eina tíð hava ligið í venjaraloysi, er Lotte Sørensen nú sett sum venjari*

# Landsliðið er ikki úttikið enn




*Landsliðsvenjarin, Allan Simonsen, savnar fyri fyrstu ferð í ár sínar menn um vikuskiftið*

**Sambært heimasíðuni hjá svenska fótbóltssambandinum er føroyski hópurin til dystin í Svøríki longu úttikin. Allan Simonsen sigur tó, at talan ikki á nakran hátt er um ein endaligan hóp**

LANDSLIÐIÐ
*Jákup Mørk*

»Färöarnas trupp mot Sverige«. Soleiðis stendur at lesa á heimasíðuni hjá svenska fótbóltssambandinum, www.svenskfotboll.se, og tað hevur tað gjørt nú í okkurt um eina viku.

Um so er, at onkur av lesarunum hevur leitað sær inn á slóðina hjá fótbóltssambandinum, so er tað ivaleyst komið dátt við, at sviar longu nú vita, hvussu føroyski hópurin sær út. Ikki minst, tí Allan Simonsen ikki hevur fyrstu venjingarnar á árinum fyrr enn um vikuskiftið, har eitt slag av bruttohópi er innkallað. Harumframt tykist tað eisini løgið, at níggju av leikarunum, sum eru innkallaðir til venjingina, ikki eru í hópinum, sum svenska fótbóltssmbandið sigur seg hava fingið frá Allani Simonsen.

### Vildu hava nøvn

Spurdur, um tað er sambært upplýsingum frá honum, at sviar kunnu kunngera føroyska hópin, sigur Allan, at tað er rætt, at hann hevur givið teimum ein lista við 18 nøvnum.

– Sviar vildu hava ein hóp, sum teir kundu nýta í teirra upptakt til dystin, og tað hava teir so fingið. Tað er tó als ikki víst, at hetta er tann hópurin, sum fer til Svøríkis seinast í mánaðinum.

– Fyrstu landsliðsvenjingarnar eru jú ikki fyrr enn um vikuskiftið, og tað hevði verið eitt sindur løgið, um eg longu nú hevði gjørt av, hvør verður á landsliðnum. Tað er nakað, sum eg ikki geri av, fyrr enn báðar tær fyrstu venjingarlegurnar eru fingnar aftur um bak. Orsøkin til listan hjá svium er sum sagt, at teir vildu hava ein lista við leikarum, og hetta hava teir so fingið.

### Ikki móti Noreg

Sum sagt, so eru tað fyrstu venjingarnar á árinum, sum landsliðsvenjarin nú fer undir, og dyturin í Svøríki verður somuleiðis fyrsti dysturin á árinum.

Tað varð annars arbeitt við, at dysturin móti Noreg í norðurlendsku kappingini eisini skuldi leikast um saman mundi, men hetta verður so av ongum í hesum umfari, sigur Allan Simonsen, sum eisini er eitt sindur harmur um hetta.

– Vit høvdu vóna, at tað bar til at avgreiða báðar dystirnar samstundis, men hetta hevur so av ymsum ávum ikki verið gjørligt.

– Tað er tó ikki so nógv at gera við tað, og eg má so bara arbeiða víðari við hópinum, so teir verða so væl fyri sum gjørligt. Tað er greitt, at venjingarstøðan í løtuni ikki kann vera optimal, men tað er so nakað, sum vit mugu arbeiða fram ímóti, sigur Allan Simonsen at enda.



Almanna- og Heilsumálastýrið
*Starvsfólkadeildin*

## Deildarsjúkrasystir til Anæstesideildina

Tænastumannastarv sum deildarsjúkrasystir á Anæstesideildini er leyst at søkja til seta 1. mars 2001 ella eftir avtalu.

Á deildini eru 8 anæstesisjúkrasystrar íroknað deildarsjúkrasystrina, sum samstarva tætt saman við 3 anæstesiyvirlæknum. Umleið 2.500 anæstesiir verða gjørdar um árið á deildini.

Av tí, at arbeiðið er so fjølbroytt, eru avbjóðingarnar í starvinum sera spennandi.

Deildarsjúkrasystirin hevur undir ábyrgd fyri sjúkrarøktarstjóranum ta sjúkrarøktarfakligu leiðsluna.

**Krøv til umsøkjarar:**
- prógv sum anæstesisjúkrasystir
- útbúgving og royndir innan leiðslu – DSH ella líknandi
- hug og evnir at leiða og menna deildina
- royndir innan anæstesiøkið
- áhuga og royndir við fakligari starvsfólka-menning
- góð samstarvsevni
- skal verða sjálvstøðugur, kreativur og hava visiónir
- skal hava ætlanir um frálæru og góðskumenning av starvsfólkunum og anæstesifakinum

**Vit kunnu bjóða:**
- eitt dynamiskt, fjølbroytt og vinarligt arbeiðsumhvørvi
- fakliga kompetentar og virknar starvsfelagar
- positivt tvørfakligt samarbeiði
- ávirkan á fakliga menning
- góða innleiðslu (introduktión)

**Setanartreytir:**
Løn og setanartreytir smb. sáttmálan millum Sjúkrasystrafelag Føroya og Fíggjarmálastýrið.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Óluvá Lómstein, virkandi deildarsjúkrasysstir, telefon 31 35 40, lokal 486 ella kallara (81)138 ella til Marin Vang, sjúkrarøktarstjóra, lokal 266.

Umsóknarfreistin er 18. februar 2001 kl. 12.00.

Skrivligar umsóknir við avriti av prógvum og viðmælum e.l. skulu sendast til:

**Almanna- og heilsumálastýrið**
Starvsfólkadeildin
Eirargarður 2
100 Tórshavn

Almanna- og Heilsumálastýrið
*Starvsfólkadeildin*

## Sjúkrasystir til Anæstesideildina

Fulltíðarstarv sum sjúkrasystir á Anæstesideildini er leyst at søkja til seta 1. mars 2001 ella eftir avtalu.

**Setanartreytir:**
Løn og setanartreytir smb. sáttmálan millum Sjúkrasystrafelag Føroya og Fíggjarmálastýrið.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Óluvá Lómstein, virkandi deildarsjúkrasystir, telefon 31 35 40, lokal 486 ella kallara (81)138 ella til Marin Vang, sjúkrarøktarstjóra, lokal 266.

Umsóknarfreistin er 18. februar 2001 kl. 12.00.

Skrivligar umsóknir við avriti av prógvum og viðmælum e.l. skulu sendast til

**Almanna- og heilsumálastýrið**
Starvsfólkadeildin
Eirargarður 2
Tórshavn

## Almennir fundir

**hjá Leirvíkar Bygdarráð í 2001 verða hesar mánadagar kl. 19.30:**

15. januar
5. februar
5. mars
2. apríl
7. mai
18. juni
3. september
1. oktober
5. november
3. desember

Mál, sum skulu verða viðgjørd á bygarráðsfundi, skulu vera kommununi í hendi 14 dagar áðrenn fundin.

Kommunuskrivstovan er opin:

| | |
|---|---|
| Mánadag | kl. 9–12 |
| Týsdag | kl. 9–12 |
| Mikudag | kl. 9–12 |
| Hósdag | kl. 9–12 og kl. 15–17 |

Borgarstjórin er at hitta á kommunuskrivstovuni hvønn mánadag og annars eftir avtalu á tlf. 443006.

**Leirvíkar Bygdarráð**

## Frá Bóndafelagnum

**Kunnandi fundur um ES-avtaluna verður í Búnaðardeplinum fríggjadagin 12/1-2001 kl. 12.**

**Bjørn Harlou,** landsdjóralækni og
**Ásmundur Guðjónsson**
frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni luttaka.

**Formaðurin**

**NORDSTJERNESTIPENDIUM TIL ÅLAND OG GRØNLAND**

Nordens Hus udlyser hermed et stipendium på indtil

**DKR. 25.000**

Til studierejse til Åland og Grønland

Stipendiet er regnet til kulturarbejde, journalister og lærere bosiddende på Færøerne. Stipendiet skal anvendes inden udgangen af 2001. Skriv ansøgningen på dansk, norsk eller svensk og send ansøgningen til:

Nordens Hus på Færøerne
Postbox 1260
100 Tórshavn

Kuverten skal mærkes:
NORDSTJERNESTIPENDIUM
Fristen at søge er 15. januar 2001

**NORÐURLANDAHÚSIÐ Í FØROYUM**

## Stranda Skúli

Søkt verður eftir 1 vikari fyri lærara í barnsburðarfarloyvi frá **1. februar 2001** og skúlaárið út.

Starvið verður lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið.

Umsóknir skulu vera skúlanevndini í hendi í seinasta lagi 25. januar 2001.

**Sjóvar Sóknar skúlanevnd**
Mass Djurhuus
494 Innan Glyvur

veitst tú ikki tað?
Sosialurin

**Bakaralærlingur**

Vit søkja eftir einum lærlingi at byrja skjótast gjørligt. Áhugað kunnu venda sær til:

**Tlf. 44 43 88** ella **22 02 30**

BREYÐMOLIN